# chester United



*Duncan Edwards var kanska størsta talentið, sum bretskur fótbóltur nakran tíð hevur fostrað. Men fótbóltsheimurin slapp ongan tíð at síggja hann sum meira enn eitt risa-talent*

tey ikki til at vika. Duncan Edward er tann besti leikarin Manchester United hevur havt, eftir teirra tykki. Bobby Charlton sigur um Duncan Edwards: »Duncan er tann besti leikarin eg nakrantíð havi sæð. Tann besti leikarin eg havi leikt saman við, bæði hjá United og á enska landsliðnum. Hann er tann einasti fótbóltsleikarin, sum hevur fingið meg at kenna meg minni dugnaligan, sum fótbóltsleikara.« sigur Bobby Charlton, ein av bestu leikarunum hjá Manchester United og Onglandi nakrantíð. Duncan Edwards leikti sín fyrsta dyst fyri Manchester United ímóti Cardiff í apríl 1953. Tá var hann bara 16 og hálvt ára gamal. Tað sum var so fantastiskt við Duncan Edwards var, at hann bæði hevði skjóttleika, eitt hart skot, góðan teknikk, var krútsterkur likamliga, og hevði eitt gott sinnalag. Eldri bretar meina seg ikki at hava sæð nakran leikara, sum hevur havt allar hasar dygdirnar. Tað, at hann livdi 15 dagar aftaná flogvannlukkana er eitt dømi um hvussu sterkur Edwards var. Har vóru fleiri bein brotin, og nógvir innvølir vóru skaddir. Flest øll onnur høvdu verið deyð av skaðunum beinavegin. Hóast Duncan Edward bert var 21 ár tá hann doyði, so hevði hann longu leikt 18 A-landsdystir fyri Ongland. Fótbóltsserfrøðingar seta eisini spurnartekin við, um Brasilia hevði vunnið HM í 1958, um »The Busby Babes« høvdu verið við til at manna enska landsliðið? Men tað er so ein spurningur, sum ongantíð verður svaraður.



*Matt Busby, sum telist millum størstu venjaralegendurnar yvirhøvur, varð illa skølaður. Men hann kom frá vanlukkuni við lívinum*

## Vanlukkan fyllir nógv

Ein kemur ikki uttan um, at flogvanlukkan hin 6. februar i München fyllir nógv í søguni hjá Manchester United. Og sjálvandi kann søgan ikki undganga at røra hjartastreingirnar hjá United-viðhaldsfólkum kring allan heimin. »Flogvanlukkan er høvuðsorsøkin til, at Manchester United hevur so nógv viðhaldsfólk« er ein nógv nýtt frasa hjá viðhaldsfólkum hjá øðrum feløgum. Stórleikarar og góð úrslit hava nú eisini gjørt sítt. Tað, at mong fólk halda við Liverpool skyldast nú heldur Bill Shankly, Kenny Dalglish, Allan Hansen og Ian Rush, enn tað skyldast Heysel og Hillsborough. Tær hendingarnar fylla sjálvsagt eisini nógv í søguni hjá Liverpool FC, men 18 ensk meistaraheiti, og 5 evropeisk meistaraheiti eru so ikki ein vánalig umbering fyri at halda við Liverpool. Skuldi ein nýtt sama anti-logikk um italskan fótbólt, so skuldi Torino FC verið eitt nógv betri umtókt lið, enn Juventus, sum eisini er úr Torino. Ótrúliga góðu leikarnir hjá »Il Grande« liðnum hjá Torino FC blivu allir dripnir í einari flogvanlukku, sum hendi uttanfyri Torino hin 4. maj í 1949. Øll 31 fólkini umborð blivu dripin. Hetta liðið vann italska meistaraheitið fleiri ferðir. Men liðið hevði ein gjøgnumsnittsaldur uppá 30 ár. Busby Babes hevði ein gjøgnumsnittsaldur uppá 24 ár. Syndarliga vanlukkan hjá Torino FC hevur kortini ikki merkt, at teir hava líka nógv viðhaldsfólk sum Juventus, Inter, AC Milan, Roma ella Lazio. So vit koma ikki uttan um, at framúrskarandi leikarar og stórir sigrar framala nógv viðhaldsfólk hjá øllum stórum feløgum.

## Tordi ikki við

Tá føroyska fótbóltslandsliðið spældi móti Cypros, var ein av leiðarunum hjá Cypros John Yiannakis. Sami John Yiannakis skuldi eftir ætlan vera umborð á vanlukkuflogfarinum fyri 50 árum síðani, og í Sosialinum fyri tveimum árum síðani greiddi hann frá søgu sínari sínari.

- Eg kendi fleiri av spælarunum hampuliga væl. Dennis Violet, Johnny Berry og fleiri aðrir taldust millum vinmenninar hjá mær. Ein partur, sum hevði nógv størri týdning tá í tíðini, tá lønin hjá okkum vanliga var eini £20 um vikuna.

- Eg var so eisini millum teirra, sum hugdu at fyrra dystinum móti Reyðu Stjørnu í 1/4-finaluni av Europa Cup kappingini. Ein dystur, sum United vann 2-1, og tað skuldi sjálvandi feirast. Ikki minst var talan um eitt einastandandi kvøld, tí vit koyrdu eitt sindur í konurnar hjá spælarunum, sum valla megnaðu at standa á beinunum, flennir hann.

- Tað endaði alt við, at spælararnir spurdu meg, um eg ikki kom við flogfarinum til útidystin, og hesum játtaði eg. Flogið varð knappar tvær vikur eftir ballið, men í seinastu løtu gav eg avboð. Eg hevði ongantíð flogið fyrr, og dirvið var kortini ikki til at royna tað hesaferð.

Uttan John varð soleiðis ferðast til jugoslaviska høvuðsstaðin, har ensku meistararnir við einum 3-3 javnleiki spældu seg í hálvfinaluna. Men á heimferðini hendi so vanlukkan. Flogfarið var ikki nóg væl avísað, og eftir millumlending í München gekk galið. 22 fólk doyðu á staðnum - teirra millum 7 spælarar. Og stutt eftir doyði eisini Duncan Edwards av løstunum, sum hann fekk. Duncan Edwards hevði longu tá verið yngsti spælarin í søguni hjá ensku 1. deild, og hann hevði eisini metið sum yngsti landsliðsspælarin hjá Onglandi.

- Tað var jú ræðuligt. Dennis, ið var tann av spælarunum, sum eg kendi best, slapp við lívinum, men hann er so kortini farin nú. Men sjálvt um hann slapp livandi úr München, so varð hann ongantíð tann sami á vøllinum. Eins og hevði hann fingið ein skelk og eina áminning um, at slíkt altso kann henda í veruleikanum, og tann veruleikan megnaði hann helst ongantíð at góðtaka.

- Og fyri fótbóltin var tað eisini ræðuligt. Duncan Edwards, sum var kanska stórsta enska talentið um tað mundi, doyði. Hann skuldi annars verið í herinum um hetta mundið, men felagið hevði so fingið hann loystan frá hesum, soleiðis at hann kundi verið við í dystunum.

Soleiðis segði John millum annað um flogvanlukkuna, sum helst er tann gitnasta í flogsøguni. Sjálvur steig John so ongan tíð umborð á flogfarið. Men eins og hjá reyðum fjepparum kring allan heimin, man eisini hann minnast dagin í dag sum nakað heilt serligt.



*Seinasta minnið, sum John hevði við the Busby Babes var, tá teir skuldu feira heimasigurin móti Reyðu Stjørnu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*